# Topalov heimsmeistari

**Bulgariumaðurin Veselin Topalov var í serklassa, tá heimsmeistarakappingin í talvi varð leikt í San Luis, Argentina**

HM Í TALVI

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Tá Topalov leikti javnt ímóti Kasimjanov í trettanda og næstseinasta umfari, varð greitt, at Topalov varð heimsmeistari. Nærmastu kappingarneytarnir Anand og Svidler máttu tá geva skarvin yvir.



*Veselin Topalov sigur seg vera fyri einum dysti, sum eina ferð med alla kann gera av, hvør er heimsins besti telvari*

## Vældámdur heimsmeistari

Tað eru bert góð og rósandi orð ein hoyrir um okkara nýggja heimsmeistara. Allir talvjournalistar og telvarar eru í øllum førum glað fyri sigur Topalovs.

Kanska ein orsøk er, at Topalov nú er opin fyri øllum møguleikum at samansjóða telvingina. Vit hava síðani 1993 havt ein fløkta støðu við tveimum heimsmeistarum. Vónandi verður tað skjótt søga, nú Topalov sigur seg vera heitan fyri einum dysti móti Kramnik ella sjálvum Kasparov. Eg vildi hildið, at fyrst er neyðugt at telva ein dyst móti Kramnik áðrenn talan kann verða um, at Kasparov kemur inn í myndina aftur. Um pensioneraða legendan yvirhøvur er áhuga, er ein onnur søk.

Venjarin hjá Topalov mongu seinastu árini, Silvio Dainalov, nevnir novembur 2006 sum eitt gott og realistiskt tíðspunkt til ein ultimativan HM-dyst. Spurningurin er so um altjóða talvsamgongan FIDE og Kramnik eisini síggja ljóst uppá hendan møguleika.

## Fyrra helvtin avgjørdi

Topalov var í serklassa í San Luis. Eftir eina óhoyrda fyrru helvt, har hann skúgvaði alla mótstøðu til viks, gearaði Topalov nakað niður og remiseraði seg til heimsmeistaraheitið. 6 sigrar og 8 javnleikir.

Topalov er sera sterkur á øllum økjum. Tað er ikki av tilvild at hann er heimsmeistari. Kanska ein veikleiki er, at hann til tíðir tykist heldur ótryggur tá hann hevur vinnandi fyrimun og skal avgera talvini. T.d. hevði hann slíkar støður ímóti Anand og Morozevich, sum ikki góvu meira enn javnleikar. Men tað er so tað einasta neiliga ein kann siga um telvingina hjá honum. Hann dugur eitt nú væl at koma í støður, ið hann veit mótstøðumennirnir ikki dáma. Ein sterkur allround telvari við kombinatoriskum eginleikum í serklassa.

Anand vaknaði upp úr dvala í seinnu hálvu. Men kortini varð hann alt ov stuttur til at hótta Topalov. Anand vinnur sær nakað av rating omaná sítt høga 2788 ratingtal og tí varð hansara úrslit á heilt góðari leið.

Svidler verður av teimum flestu undirmettur. Hann fær ikki so ofta innbjóðingar til sterkastu kappingarnar, so sum Linares og Wijk aan Zee, men eftir HM-kappingina eiga fleiri hurðar at opnast fyri honum. Hann telvaði rættiliga sannførandi og tapti einans eitt talv. Ímóti Topalov, sjálvandi.

Fjórði maðurin í røðini varð Morozevich. Ilt sá út hjá honum fyrstu umførini, men tríggir sigrar á rað miðskeiðis í kappingini broytti hesa støðu. Hann Topalov í fyrsta umfari, reistist hann og hevði 50% skoru tá kappingin var hálvrunnin. Men so knekkaði Leko óvæntað og vann ikki aftur fyrr enn í seinasta umfari.

Adams og Kasimjanov fingu báðir 5,5 stig. Adams hevur ikki telvað serliga væl seinasta árið og í San Luis vann hann einki talv. Trý tap og ellivu javnleikir stríddist væl sum hann plagar og av og á sóu vit hansara eyðkenda talvstíl. Morozevich er helst nøgdur við 50% skoruna.

## Botnurin

Størsta vónbrot varð Leko. Eftir at hann tapti ímóti




*Judit Polger er fremsti kvinnuligi telvarin í heiminum, men hon hevði ikki nakra serliga góða kapping í Argentina*

er einki at reypa av. Kasimjanov, sum hevði lægsta ratingtal, kann hinvegin vera hampiliga nøgdur við avrikið. Hann stendur í stað í rating.

Fremsta kvinnan í heiminum, Judit Polgar, hevði eina vánaliga kapping. Hon hevði annars bert havt góð úrslit í seinastuni, men í Argentina tyktist hon ikki at vera serliga væl fyrireikað. Serliga galið var byrjanarspæl hennara. Hon er væl betur enn úrslit sítt og kemur ivaleyst sterkt aftur.

**Endaliga støðan**

| Navn | Land | Rat. | Stig |
|---|---|---|---|
| Topalov | Bulg | 2788 | 10,0 |
| Svidler | Russ | 2738 | 8,5 |
| Anand | India | 2788 | 8,5 |
| Morozevich | Russ | 2707 | 7,0 |
| Leko | Ung | 2763 | 6,5 |
| Kasimjanov | Usbk | 2670 | 5,5 |
| Adams | Ong | 2719 | 5,5 |
| Polgar | Ung | 2735 | 4,5 |

# Allir føroyingarnir vóru á vøllinum

**Johan B. Hansen, sum alla tíðina var í verjuni hjá Horsens, var tann einasti av føroysku landsliðsspælarunum í superliguni, sum fekk stig**

SUPERLIGAN

*Jóannes Hansen*

Tá ið dómararnir bríksluðu fyri síðstu ferð í trettanda umfarinum í superliguni, sum var á skránni í vikuskiftinum, vóru tríggir føroyskir landsliðsspælarar á fremstu fótbóltsvøllunum í Danmark. Bara hjá einum teirra eydnaðist tað at fáa stig.

Johan B. Hansen var tann einasti, sum var á vøllinum alla tíðina. Hann var vinstri vongverji hjá Horsens, sum á heimavølli var partur av málleysum javnleiki móti FC Nordsjælland. Hetta var sætti javnleikurin hjá Horsens í trettan dystum. Staðfest verður í Danmark, at Horsens hevur ikki álopstyngd at spæla seg til sigrar, og tí er tað í verjupartinum, sum Johan B. Hansen er liður í, at teir verja seg til stig.

Súni Olsen varð beinanvegin eftir steðgin settur á vøllin, tá ið AaB vitjaði í Esbjerg. Sambært svenska AaB venjaran, so hevur Esbjerg í fyrsta stóra triðinginum av kappingini verið tað liðið, ið úrslitaliga hevur verið størsta vónbrotið, meðan hann heldur, at AaB hevur verið næststørsta úrslitaliga vónbrotið.

Í Esbjerg hilnaðist tað ikki væl hjá AaB, sum tapti 2-1. Súni Olsen hevði góða frísparksroynd, men bólturin fór dygst omanfyri tvørtræið. Tá ið Esbjerg fekk sigursmálið, kundi tað sæð út sum um, at Súni Olsen átti at havt verið nærri manninum, sum skoraði.

Rógvi Jacobsen var síðstu løtuna á vøllinum, tá ið SønderjyskE, sum er aftast í superliguni, hevði vitjan av Brøndby, sum er næstovast. Munurin á liðunum var ikki so ógvuliga stórur, og serliga í 1. hálvleiki megnaði botnliðið at hótta stjørnurnar. Brøndby tóktist hava tamarhald á støðuni í 2. hálvleiki, tá ið teir vóru frammanfyri 2-0, og teir høvdu møguleikar at økja um leiðsluna til 3-0. Teir søplaðu møguleikarnar burtur, og tá ið Sønderjyske eftir fríspark úr vinstru við snittara minkaði um munin til 2-1, kom rættuligur spenningur í.

Rógvi Jacobsen hevði okkurt gott innlegg, og hann var framvið fleiri ferðir, tá ið langar sendingar vórðu lagdar í nógv mannaða brotsteigin framman fyri Brøndby málverjan, men tað spurdist ikki meiri burturúr, og so hevði SønderjyskE tapt fyri níggjundu ferðina í hesum kappingarárinum.

## Toppliðini vunnu

FCK er framvegis oddalið. Teir vóru ógvuliga sannførandi, tá ið teir vunnu 3-0 í Silkeborg. Hetta var tíggjundi sigurin hjá FCK í trettan dystum, og eftir trettan umfør hava teir ikki tapt. Úrtøkan er 33 stig, og tað boðar frá framúr støðugum avrikum.

Viborg hongur væl uppi í teimum báðu stóru úr høvuðsstaðnum. Leygardagin var Viborg í Herning, og teir vunnu 1-0 á FCM, sum higartil hevur verið stórt vónbrot.

OB er á fjórða plássinum. Hesa ferð vunnu teir 3-1 á AGF, sum skifti venjara fyri tveimum vikum síðani. Spælararnir skulu pískast til at stríðast meiri fyri søkini, siga teir í AGF. Og tað er nógv at stríðast fyri, tí AGF er av álvara hótt av niðurflytingar strikuni.